Umhvørvismálaráðið

Dagfesting:	7. mars 2024
Mál nr.:	24/00911-1
Málsviðgjørt:	ARØ
Ummælistíð:	Frá 14. februar 2024 til 26. februar 2024 kl. 12
Eftirkannað:	27. februar 2024

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)
(Hækkan av útgjaldshámarkinum, barsilspeningur til nýútbúgvin o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, sum seinast broytt við § 2 í løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 3, stk. 4, § 8, stk. 4, § 12, stk. 3, § 13, stk. 3, § 14, stk. 2, § 15, stk. 3, § 19, stk. 3 og 4, § 19 a, stk. 7, 1. og 2. pkt., og stk. 8, § 20, stk. 2 og 3, § 23, § 24, stk. 1 og 2, og § 25, stk. 1, 1. pkt., og stk. 2, verður "Landsstýrismaðurin" broytt til: "Landsstýrisfólkið".

2. § 8, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Skyldur og rættindi sbrt. hesi løgtingslóg eru knýtt at móttiknum inntøkum, sum eftir skattalógini eru A-inntøkur, inntøkum av sjálvstøðugari vinnu sbr. § 20 og lestrarstudningi sbr. § 20 a."

3. Í § 13, stk. 1 verður "kr. 25.000" broytt til: "30.000 kr.".

4. Í § 15, stk. 2, 3. pkt., § 21, stk. 1, og § 25, stk. 1, 2. pkt. verður "landsstýrismaðurin" broytt til: "landsstýrisfólkið".

5. Í § 15 a, stk. 1, 1. pkt., og § 22 verður "landsstýrismanninum" broytt til: "landsstýrisfólkinum".

6. Í § 15 a, stk. 3 verður "Landsstýrismaðurin í vinnumálum" broytt til: "Landsstýrisfólkið".

7. Í § 17, stk. 2 verður "smbrt." broytt til: "sbrt.", og í nr. 1 verður "men ikki 67

ár” broytt til: “men ikki hava nátt fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a.”.

8. § 18, nr. 1 verður orðað soleiðis:
“1) fólkapensjón, fyritíðarpensjón og framskundað pensjón,”.

9. § 18, nr. 2 verður orðað soleiðis:
“2) aðrar skattskyldugar almannaveitingar, tó ikki dagpening sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m., endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sbrt. § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og lønaríkoyti til tillagað starv sbrt. § 21 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk,”.

10. Heitið á kapitli VII verður orðað soleiðis:

“**Sjálvstøðug vinnurekandi, nýútbúgvin o.o.**”

11. Aftan á § 20 verður í kapitli VII sett:

“**§ 20 a.** Hjá teimum, sum eru nýútbúgvin og ikki longur hava rætt til stuðul frá Studna, verður studningur, móttikin seinastu 12 mánaðirnar fyri fráveruna, taldur við í útrokningargrundarlagið sbrt. § 12, stk. 1, 1. pkt. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um barsilspening til nýútbúgvin.”

12. Í § 21, stk. 1 verða aftan á 1. pkt. sum nýggj pkt. sett:
“Landsstýrisfólkið kann eisini fáa váttan um mettan føðidag og fráboðan um barnsburð beinleiðis frá Heilsuverkinum umframt læknaváttan um, at tað stendst heilsuvandi fyri fostur og/ella kvinnuna sjálva av at vera í starvinum, og váttan beinleiðis frá Familjufyrisitingini um faðirskap og sammóðurskap og kunning um avgerð um, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við ættleiðing.”

13. Í § 21 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
“*Stk. 2.* Upplýsingarnar, ið landsstýrisfólkið hevur tørv á frá øðrum myndugleikum fyri at kunna útinna uppgávurnar sambært hesi lóg, kunnu fáast til vega við beinleiðis atgongd til elektronisku upplýsingarnar í telduskipanunum hjá viðkomandi myndugleikum.”
Stk. 2 verður eftir hetta stk. 3.

14. Í § 21, stk. 2, sum verður stk. 3, verður “landsstýrismanninum tær upplýsingar, hann biður um” broytt til: “landsstýrisfólkinum tær upplýsingar, biðið verður um”.

15. Aftan á § 23, men áðrenn yvirskriftina yvir § 24, verður sett:

“**§ 23 a.** Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast Barsilsskipanini elektroniskt, og kann áseta nærri reglur um elektroniska samskiftið.”

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2024.
Stk. 2. § 1, nr. 2, er galdandi fyri barsilsfarloyvi við barsilsútgjaldi frá og við 1. juli 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Síðani Barsilsskipanin varð sett á stovn, hevur áhaldandi verið arbeitt við at gera hana betri. Við hesum verður skotið upp at gera fleiri viðurskiftir í Barsilsskipanini betri.

Hámark fyri barsilspeningi

Hámarkið fyri útgjaldi úr Barsilsskipanini á 25.000 kr., sum varð ásett í 2004, er ikki tillagað síðani, hóast munandi vøkstur í lønarlagnum. Skotið verður upp at hækka hámarkið fyri barsilsútgjald úr 25.000 kr. um mánaðin upp í 30.000 kr. um mánaðin.

Barsilspeningur til nýútbúgvin

Nýútbúgvin, sum gerast foreldur, hava einans møguleika at fáa barsilspening í tann mun, tey hava arbeitt seinasta árið fyri fráveruna orsakað av viðgongutíð, barnsburði ella ættleiðing. Ofta hevur verið tosað um, at hesi detta niður í millum skipanirnar, tí tey ikki longur eru í lestrarskipanini og eru ikki rættiliga komin inn á arbeiðsmarknaðin. Um tey t.d. eiga eina uppsparing, sum er størri enn 30.000 kr., hava tey ikki møguleika fyri at fáa fyribils uppihaldsveiting í sambandi við barnsburð frá Almannaverkinum.

Við hesum verður skotið upp, at studningur, sum tey nýútbúnu hava móttikið seinasta árið fyri fráveruna, skal telja við í útrokningargrundarlagnum fyri útrokningina av barsilspeningi. Hetta kann grundgevast við, at tey nýútbúnu jú hava nomið sær útbúgving, sum skal brúkast á arbeiðsmarknaðinum, og at flestu av teimum fara at rinda inn til Barsilsskipanina av framtíðarlønini alt arbeiðslívið. Á hendan hátt detta tey nýútbúnu ikki niður í millum skipanina við lestrarstuðli og Barsilsskipanina, um tey gerast foreldur í tíðarskeiðinum eftir loknan lestur, og áðrenn tey eru komin í arbeiði.

Annað

Harumframt skulu nakrar tekniskar broytingar gerast í barsilslógini orsakað av broytingum í aðrari lóggávu og orsakað av, at nýggj kt-skipan verður ment til Barsilsskipanina. Eisini verður "landsstýrismaðurin" broytt til "landsstýrisfólkið" alla staðni í lógini.

1.2. Galdandi lóggáva

Barsilspeningur

Barsilspeningur er 100% av A-inntøkuni, sum løntakarin í miðal hevur móttikið seinastu 12 mánaðirnar undan barsilsfarloyvinum. Tó kann barsilspeningurin í mesta lagi vera 25.000 kr. um mánaðin umframt eftirlønargjaldið. Tá ið Barsilsskipanin varð sett á stovn í 2001, var hámarkið 35.000 kr. um mánaðin. Í 2004 varð hámarkið lækkað niður í 25.000 kr. um mánaðin og hevur síðan verið óbroytt. Í løgtingslógini er ein heimild til landsstýrismannin at hækka hámarkið við støði í lønargongdini í samfelagnum, men hon hevur ongantíð verið brúkt.

Onki minsta útgjald er í Barsilsskipanini, men endurrindað verður í tann mun, viðkomandi hevur havt inntøkur, sum eru tryggjaðar. Tað, sum er avgerandi fyri, um – og í hvønn mun – barsilspeningur skal útgjaldast ella gjaldast skal til skipanina, er, um inntøkurnar kunnu verða mistar orsakað av barnsburði ella ættleiðing. Inntøkur, sum kunnu verða mistar orsakað av barnsburði, eru inntøkur av egnum arbeiði, lønarinntøkur, inntøkur, ið koma í staðin fyri lønarinntøkur, ella inntøkur av sjálvstøðugum vinnuvirksemi. Um so er, at tey, ið gerast foreldur, ikki hava rætt til barsilspening ella einans hava rætt til lítið av barsilspeningi, kunnu tey søkja Almannaverkið um fyribils uppihaldsveiting í sambandi við barnsburð. Hendan

veiting verður veitt í sama tíðarskeið, sum Barsilsskipanin gevur rætt til barsilspening. Fyribils uppihaldsveitingin í sambandi við barnsburð verður veitt, soleiðis at uppihaldsveitingin og onnur inntøka til stakar uppihaldarar tilsamans er 17.907 kr. um mánaðin, og 13.928 kr. um mánaðin til sambúgvandi.

Barsilsgjald og gjaldskyldug
Inngjaldið til Barsilsgrunnin upp á 0,86% verður sum útgangsstøði goldið av allari móttiknari og rindaðari A-inntøku. Barsilsgjaldið varð hækkað úr 0,71% upp í 0,86% 1. januar 2021; samstundis varð rætturin til barsilspening longdur til 52 vikur eftir føðing. Tá ið barsilsgjaldið varð hækkað upp í 0,86%, varð mett, at inngjøld og útgjøld fóru at javnviga í 2026, tá ið eftirlønargjaldið sambært eftirlønarlógini ikki hækkar meira. Gongdin seinastu tvey árini hevur tó víst, at skipanin hevur størri avlop enn væntað, og tí ber til at gera ábøtur, uttan at tað er neyðugt at hækka inngjaldið.

Gjaldskyldug eru øll, sum fáa A-inntøku, sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, og sum hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, og øll, sum rinda A-inntøku í Føroyum. Fólkapensjónsaldurin er ásettur í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. 1. juli 2024 hækkar fólkapensjónsaldurin úr 67 árum upp í 67 ½ ár.

Rættindir og skyldur sambært løgtingslógini eru knýtt at móttiknum inntøkum, sum eftir skattalógini eru A-inntøkur, og inntøkum av sjálvstøðugari vinnu. Lestrarstudningur er ikki A-inntøka og telur tí ikki við í útrokningargrunarlagnum fyri barsilspening.

Barsilsgjald verður sum útgangsstøði goldið av allari móttiknari og rindaðari A-inntøku; undantiknar eru skattskyldugar almannaveitingar, m.a. fólka- og fyritíðarpensjón. Í almannapensjónslógini er nú ásett eitt nýtt slag av pensjón, sum nevnist “framskundað pensjón”, sum eisini eigur at vera fevnd av undantakinum, soleiðis at barsilsgjald ikki verður rindað av framskundaðari pensjón. Talan er ikki um ein nýggjan málbólk, men heldur, at nakrir borgarar í staðin fyri fyritíðarpensjón nú fáa framskundaða pensjón.

Hóast endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku til persónar, sum uppihalda barni við likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku heima, er ein skattskyldug almannaveiting, skal barsilspeningur rindast av hesi inntøku, tí hon kemur í staðin fyri lønarinntøku. Forsorgarlógin varð avtikin, tá ið løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur varð sett í gildi 1. januar 2021. Konsekvensbroyting er ikki gjørd í barsilslógini.

Í royndum verður barsilsgjald kravt av lønarískoyti til tillagað starv, hóast tað ikki stendur í barsilslógini. Lønarískoyti til tillagað starv er ein veiting frá Almannaverkinum, ið kemur í staðin fyri løn frá arbeiðsgevara, tí eigur barsilsgjald at verða rindað av lønarískoytinum, og lønarískoytið eigur at telja við í útrokningargrundarlagnum, tá ið barsilspeningur verður roknaður. Neyðugt er at nágreina barsilslógina í mun til verandi praksis.

Nýsett
Hjá teimum, sum beint framman undan barsilsfarloyvinum hava verið á arbeiðsmarknaðinum í styttri tíð enn 12 mánaðir, verður barsilspeningurin roknaður eftir miðal móttiknu gjaldskyldugu A-inntøkuni ta styttu tíðina, tey í royndum hava verið á arbeiðsmarknaðinum. Tað stytta útrokningartíðarskeiðið kann tó ikki vera styttri enn tríggir mánaðir. Hetta er gjørt fyri tey, ið eru nýggj á arbeiðsmarknaðinum, og er ein slaking av meginregluni um, at einans inntøkur, sum er tryggjaðar, verða endurrindaðar úr Barsilsskipanini. Ítøkiliga merkir hetta fyri ein, sum hevur lokið útbúgving og ikki hevur arbeitt í lestrartíðini, sum fær eitt starv eftir lokna

útbúgving og arbeiðir í t.d. fimm mánaðir, áðrenn viðkomandi fer í barsilsfarloyvi, at barsilspeningurin verður roknaður eftir miðalinntøkuni hesar seinastu fimm mánaðirnar og ikki eftir vanligu regluni um eitt 12 mánaðar útrokningartíðarskeið.

Talgilt samskifti og útflýggjan av upplýsingum
Ongin áseting er í barsilslógini um talgilt samskifti ella um, at Barsilsskipanin kann fáa neyðugar upplýsingar beinleiðis úr telduskipanunum hjá øðrum myndugleikum.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálini við lógaruppskotinum eru at hækka hámarkið fyri mánaðarliga barsilsútgjaldið úr 25.000 kr. upp í 30.000 kr. og at geva nýútbúnum eitt betri útrokningargrundarlag, enn tey hava nú. Eisini verða nakrar fylgibroytingar gjørdar, soleiðis at barsilslógin verður í samsvari við broytingar í aðrari lóggávu, umframt at løgtingslógin verður tillagað praksis, og heimild verður givin landsstýrisfólkinum at áseta reglur um talgilt samskifti og at fáa neyðugar upplýsingar beinleiðis úr telduskipanunum hjá øðrum myndugleikum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Hámarkið á mánaðarligum barsilspeningi
Síðan Barsilsskipanin varð sett á stovn í 2001, er hon áhaldandi broytt. Rætturin til barsilspening er m.a. tvífaldaður; úr 26 vikum eftir barnsburð upp í 52 vikur eftir barnsburð. Hóast áhaldandi batar eru gjørdir á rættin til barsilspening, er hægsta útgjaldið úr Barsilsskipanini ikki broytt í nærum 20 ár, hóast miðalinntøkan hjá føroyskum løntakarum er vaksin nógv hesa tíðina. Við hesum lógaruppskotinum verður hámarkið fyri barsilspening hækkað við 5.000 kr. um mánaðin; úr 25.000 kr. upp í 30.000 kr. umframt eftirlønargjaldið. Á henda hátt fáa tey, ið vanliga tjena omanfyri 25.000 kr. um mánaðin, endurrindað upp til 30.000 kr. úr Barsilsskipanini, tá tey fara í barsilsfarloyvi.

Barsilspeningur til nýútbúgvin
Lestrarstuðul er ikki ein A-inntøka og gevur tí hvørki rættindir ella skyldur í barsilslógini. Lesandi, sum fáa børn, hava rætt til studning í upp til 11 mánaðir fyri hvønn barnsburð. Tey, ið eru útbúgvin, hava harafturímóti ikki rætt til lestrarstuðul longur, og tey hava eins og lesandi einans rætt til barsilspening í tann mun, tey hava arbeitt við síðuna av lesnaðinum, um tey gerast foreldur beint eftir loknan lesnað.

Um so er, at ein, sum er nýútbúgvin, fær starv eftir loknan lesnað og harvið er nýggjur á arbeiðsmarknaðinum, kann eitt styttri útrokningartíðarskeið nýtast til at rokna barsilspeningin, um viðkomandi hevur arbeitt í minsta lagi í tríggjar mánaðir framman undan barsils-farloyvinum.

Við hesum uppskotinum verður skotið upp, at um viðkomandi, sum søkir um barsilspening, kann skjalprógva at hava lokið eina útbúgving, sum hevur givið rætt til lestrarstuðul, verður lestrarstuðul, móttikin seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn barsilsfarloyvið byrjar, taldur við í útrokningargrundarlagnum, sum barsilspeningur verður roknaður eftir. Lestrarstuðul, sum tann nýútbúni hevur móttikið seinasta árið áðrenn barsilsfarloyvið, telur tí eins og móttikin A-inntøka við í útrokningargrundarlagnum, tá ið barsilspeningur skal roknast til nýútbúgvin.

Nærri reglur um barsilspening til nýútbúgvin verða ásettar av landsstýrisfólkinum í kunngerð. Hetta kann t.d. vera reglur um, hvørji skjøl o.a. tann nýútbúni skal lata Barsilsskipanini, og um

ella í hvønn mun lestrarstuðul skal telja við í útrokningargrundarlagnum, samstundis sum viðkomandi er nýggjur á arbeiðsmarknaðinum, og tað stytta útrokningartíðarskeiðið kann nýtast til at rokna barsilspening eftir. Ætlanin er, at nýsett, ið hava verið á arbeiðsmarknaðinum teir kravdu tríggjar mánaðirnar millum lesnað og barsil, framvegis skulu kunna nýta regluna um styttri útrokningartíðarskeið, hóast studningur frá Studna nú telur við í útrokningargrundarlagnum.

Aldursmark hjá gjaldskyldugum
Aldursmarkið fyri tey, sum hava skyldu at rinda barsilsgjald, er frá og við 16 ár til og við 66 ár. Skotið verður upp, at aldursmarkið heldur skal fylgja fólkapensjónsaldrinum, soleiðis at skyldan at rinda barsilsgjald heldur uppat, tá ið persónar fáa rætt til pensjón. Ásett er í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., at fólkapensjónsaldurin hækkar úr 67 árum upp í 67 ½ ár og síðan upp í 68 ár. Fyri at tað ikki skal verða neyðugt leypandi at broyta aldursmarkið í barsilslógini, verður ásett, at aldursmarkið fylgir fólkapensjónsaldrinum, sum hann er ásettur í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

Framskundað pensjón
Í almannapensjónslógini er nú ásett eitt nýtt slag av pensjón, sum nevnist "framskundað pensjón", og barsilsgjald eigur ikki at verða rindað av hesi pensjón. Talan er ikki um ein nýggjan málbólk, men heldur at nakrir borgarar í staðin fyri fyritíðarpensjón nú fáa framskundaða pensjón. Í royndum verður framskundað pensjón útgoldin á sama hátt sum fyritíðarpensjón, og hesi rinda tí ikki barsilsgjald av pensjónini í dag. Tí verður skotið upp at tillaga barsilslógina til praksis, soleiðis at ongin ivi er um, at barsilsgjald ikki skal rindast av framskundaðari pensjón.

Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og lov for Færøerne om offentlig forsorg
1. januar 2021 varð løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur sett í gildi, og samstundis varð lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg sett úr gildi. Barsilslógin hevur eina tilvísing til hesa lóg, sum verður rættað við hesum lógaruppskotinum. Talan er um eina fylgibroyting, sum ikki hevur materiellar broytingar við sær.

Lønaríkoyti til tillagað starv
Í royndum verður barsilsgjald kravt av lønaríkoyti til tillagað starv eftir løgtingslóg um arbeiðsfrejmandi tiltøk. Barsilsskipanin er ein arbeiðsmarknaðarskipan, sum veitir endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku til løntakarar, ið fara í barsilsfarloyvi. Endurgjald verður somuleiðis veitt fyri tær veitingar, ið koma í staðin fyri løn. Tí eigur barsilsgjald eisini at verða kravt av lønaríkoyti til tillagað starv. Við lógaruppskotinum verður barsilslógin rættað, soleiðis at barsilsgjald skal krevjast av lønaríkoyti til tillagað starv.

Elektroniskt samskifti og atgongd til elektoniskar skipanir
Tað krevur heimild í løgtingslóg, um tað skal verða kravt av borgara ella fyritøku, at tey skulu samskifta við almennar myndugleikar elektroniskt ella talgilt. Í sambandi við, at ein nýggj KT-skipan til Barsilsskipanina verður ment, er neyðugt at fáa eina heimild í barsilslógina, soleiðis at tað kann verða kravt, at upplýsingar skulu latast Barsilsskipanini elektroniskt.

Harumframt verður gjørd áseting í barsilslógini, sum heimilar, at Barsilsskipanin kann fáa neyðugar upplýsingar beinleiðis úr telduskipanunum hjá viðkomandi myndugleikum. Á henda hátt kann nýggja kt-skipanin hjá Barsilsskipanini verða fóðrað við neyðugum upplýsingum, sum aðrir myndugleikar hava um viðkomandi, sum skal hava barsilspening.

Aðrar ábøtur
Semja er í politisku skipanini um, at aðrir tættir í barsilslógini hava tørv á dagføring. Ynski eru millum annað um at áseta eitt minsta útgjald úr skipanini, at foreldur at ov tíðliga føddum børnum og tví- og tríburum fáa betri sømdir, og at skipanin gerst meira smidlig í mun til, hvussu foreldur kunnu taka barsil. Talan er um eitt rættiliga umfatandi arbeiðið, ið helst skal hava so breiða undirtøku í politisku skipanini sum gjørligt. Hesar broytingar verða tí ikki tiknar við í hetta lógaruppskotið, men miðað verður eftir at leggja uppskot fyri Løgtingið í komandi tingsetu um hesi viðurskifti.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Umframt at lógaruppskotið var lagt til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Umhvørvismálaráðnum og á hoyringarportalin hjá landsstýrinum, fingu hesir partar uppskotið til ummælis:

Aðalráðini, Akademikarafelag Føroya, Almannaverkið, Barsilsskipanin, Bioanalytikara-felagið, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Dátueftirlitið, Ergoterapeutfelagið, Fakfelag Sjómansskúlalærara í Føroyum, Farmakonomfelagið Føroyadeild, Felag Tænastumanna Landsins, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Felagið Maskinmeistaralærarar, Felagið Radiografar í Føroyum, Flogskiparafelag Føroya, Fysioterapeutfelag Føroya, Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Handverkarafelag, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Føroya Reiðarafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroya Tekniska Lærarafelag, Føroysk Miðlafólk, Grafiska Yrkisfelagið, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðarafelag, Heilsuhjálparafelag Føroya, Heilsurøktarafelagið, Javnstøðunevndin, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, Kommunulæknafelag Føroya, Kost- og Føðslufelagið, Landsfelag Handverkaranna, Ljósmøðrafelag Føroya, Maskinmeistarafelagið, Meginfelag Føroyskra Studenta, Meginfelag Útróðrarmanna, Musikklærarafelag Føroya, Prestafelag Føroya, Samtak, Samverk, Serlæknafelag Føroya, Starvsfelagið, Studni, TAKS, Yngri Læknar, Yrkisfelag teirra, ið starvast í tryggingar-, fíggjar-, KT o.tíl. fyritøkum og Yrkisfelagið Miðnám.

Hoyringarfreistin var 26. februar 2024 kl. 12.

Umhvørvismálaráðið fekk hoyringarsvar frá Almenna- og mentamálaráðnum, Áhugafelagnum Antares, Dátueftirlitinum, Fakfelagssamstarvinum, Farmakonomfelagnum, Fíggjarmálaráðnum, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Heilsumálaráðnum, Heilsurøktarafelagnum, Javnstøðunevndini, Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, Samverk, Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Yngri Læknar Føroyar og Yrkisfelagnum Miðnám. Hoyringarsvarini eru løgd við sum fylgiskjøl 2-16. Niðanfyri er ein gjøgnumgongd av innkomnu hoyringarsvarunum og ein stutt viðmerking um, hvørja støðu Umhvørvismálaráðið hevur til ítøkiligar áheitanir og tilmælir.

Almanna- og mentamálaráðið hevur ongar viðmerkingar til lógarbroytingina, men ger vart við ein feil í viðmerkingunum um fíggjarligar avleiðingar. Sí fylgiskjal 2. Umhvørvismálaráðið hevur tikið hetta til eftirtektar, og feilurin er rættaður.

Áhugafelagið Antares ynskir at vísa á skeivleika, sum er í verandi lóg, tí at tær fýra vikurnar, sum eru markaðar til pápan/sammóðurina, ikki kunnu latast til mammuna í teimum førum, tá ið pápin ella sammóðirin ikki eru fevnd av barsilslógini. Um so er, at pápin ella sammóðirin

arbeiðir uttanlands, fær barnið ikki 52 vikur farloyvi saman við sínum foreldrum. Heitt verður á Umhvørvismálaráðið um fáa eina broyting við í uppskotið, sum tryggjar, at tær fýra markaðu vikurnar við barsilspeningi, kunnu verða fluttar til mammuna, um so er, at hitt foreldrið ikki er fevnt av barsilslógini. Sí fylgiskjal 3.

Umhvørvismálaráðið hevur valt ikki at taka áheitanina frá Áhugafelagnum Antares við í lógaruppskotið. Um so er, at annað foreldrið arbeiðir uttanlands, hevur viðkomandi foreldur sannlíkt rindað inn í okkurt slag av barsilsskipan í arbeiðslandinum og hevur harvið rætt til barsilspening haðani. Um tann, sum arbeiðir uttanlands, ikki er fevndur av eini barsilsskipan í arbeiðslandinum, ber tað til at tekna eina sjálvbodna barsilspeningatrygging fyri persónar, sum hava lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka sambært kunngerð nr. 6 frá 23. januar 2003 um sjálvbodna trygging av barsilspeningi til løntakarar. Tryggingin kostar 3.000 kr. um árið og gevur rætt til barsilspening grundað á móttiknu lønarinntøkuna seinastu 12 mánaðirnar.

Dátueftirlitið viðmerkir til serligu viðmerkingina til § 1, nr. 12 (sum nú er § 1, nr. 13) í lógaruppskotinum, at av tí at tað ikki er heilt greitt, um tað bert er í nøkrum førum, at umsóknir ikki verða viðgjørdar sjálvvirkandi og einans er grundað á automatiska viðgerð, ella um skipanin viðger umsóknir í størstan mun, og ein persónur (t.d. ein málsviðgeri) tekur endaliga avgerð í hvørjari umsókn, skal Dátueftirlitið minna á ásetingina í § 35 í dátuverndarlógini, sum sigur, at skrásetti eigur ikki at vera fyri avgerð, sum einans er grundað á automatiska viðgerð, undir hesum profilering, og sum hevur rættarvirknað ella á líknandi hátt týðandi ávirkar viðkomandi. Sum dømi um automatiska viðgerð kunnu nevnast avgerðir, sum hava við sær, at skrásetti fær noktað eina sosiala veiting. Ásetingin fevnir bara um avgerðir sum einans eru grundaðar á automatiska viðgerð. Sí fylgiskjal 4.

Umhvørvismálaráðið hevur nágreinað serligu viðmerkingina til § 1, nr. 13, soleiðis at tað greitt sæst, at kt-skipanin ongantíð sjálvvirkandi kann nokta eini umsókn um barsilspening. Umframt at málsviðgerar fara at hava eftirlit við, at skipanin tekur rættar avgerðir, fara mál altíð at verða løgd til ein málsviðgera, um so er, at okkurt ikki er í lagi við umsóknini, t.d. um upplýsingar mangla, ella givnu upplýsingarnar hava við sær, at viðkomandi ikki hevur rætt til barsilspening.

Fakfelagssamstarvið heldur tað vera eitt gott stig fram á leiðini, at útgjaldið hækkar, at nýútbúgvin fáa veruliga atgongd til skipanina, og at myndugleikaheitið verður kynsneutralt. Prinsipielt heldur Fakfelagssamstarvið, at útgjaldið altíð eigur at vera tað sama, sum um viðkomandi starvsfólk var til arbeiðis. Harafturat eigur útgjaldið at hækka samsvarandi lønarvøkstrinum á almenna arbeiðsmarknaðinum. Fakfelagssamstarvið heldur, at í nýggju § 20 a eigur eitt minstamark fyri útgjaldi at verða ásett. Ein máti at fingið hetta í fasta legu hevði verið at skipa Barsilsskipanina sum ein grunn á sama hátt sum ALS við einum stýri, sum fekk heimild til leypandi at justera útgjøldini og aðrar lutir í skipanini. Arbeiðast skal alla tíðina fram ímóti, at tað á ongan hátt skal stilla kvinnuna verri, at hon fer í barsilsfarloyvi. Til seinast eru feløgini í Fakfelagssamstarvinum sannførd um, at umboð fyri Fakfelagssamstarvið eiga at verða partur av einum møguligum arbeiðsbólki, ið skal endurskoða og dagføra barsilslógina, og at hetta hevði hóskað seg væl at verið skipað sum eitt trípartasamstarv. Sí fylgiskjal 5.

Umhvørvismálaráðið ger vart við, at bæði spurningurin um javning av barsilsútgjaldinum og spurningurin um minsta útgjald úr Barsilsskipanini verða tiknir upp næstu ferð, barsilslógin verður broytt. Enn er óvist, jústhvussu arbeiðið við at endurskoða barsilslógina fer at verða skipað, men partarnir á arbeiðsmarknaðinum verða í hvussu er tiknir upp á ráð í tilgongdini.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við endamálunum við lógaruppskotinum, sum eru at hækka barsilsútgjaldið, betra um støðuna hjá nýútbúnum umframt ymsar tekniskar broytingar. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tó tvær ítøkiligar viðmerkingar til broytingaruppskotið. Fyrra er, at barsilsútgjaldið eigur at verða javnað á hvørjum ári fyri at tryggja, at virðið av útgjaldinum ikki minkar við tíðini. Tann næsta viðmerkingin er, at tað kann vera ein fyrimunur fyri foreldur, um tey fáa møguleika at fáa eitt hægri útgjaldsloft, um tey heldur velja eitt styttri barsilstíðarskeið. Til dømis um foreldur velur at fara í barsil í níggju mánaðir heldur enn 12 mánaðir, so verður hámarkið 40.000 kr. um mánaðin. Hetta hevði verið ein útreiðsluneutral broyting fyri Barsilsskipanina, sum hevði givið foreldrum størri valmøguleikar. Føroya Arbeiðsgevarafelag vil fegið luttaka í fyrireikandi arbeiðinum við at gera fleiri broytingar í barsilslógini og vísir á, at tað er umráðandi at hava viðkomandi áhugapartar við, tá broytingar verða gjørdar í arbeiðsmarknaðarskipanum, sum hava so stóran týdning fyri teirra virkis- og sáttmálaøki. Sí fylgiskjal 8.

Umhvørvismálaráðið ger vart við, at bæði spurningurin um javning av barsilsútgjaldinum og smidleikin í Barsilsskipanini verða tiknir upp næstu ferð, barsilslógin verður broytt. Enn er óvist, júst hvussu arbeiðið við at endurskoða barsilslógina fer at verða skipað, men partarnir á arbeiðsmarknaðinum verða í hvussu er tiknir upp á ráð í tilgongdini.

Javnstøðunevndin tekur yvirskipað undir við lógaruppskotinum og metir tað vera eitt lítið stig á røttu leiðini, tó at uppskotið ikki hevur stórvegis broytingar við sær fyri javnstøðuna millum kyn sum heild. Javnstøðunevndin mælir til, at útgjaldið úr Barsilsskipanini verður javnað t.d. við at knýta útgjaldið at lønarvøkstrinum. Harumframt boðar Javnstøðunevndin frá, at Javnstøðunevndin er í ferð við at gera eina innanhýsis endurskoðan av barsilsøkinum í síni heild, og tí fer nevndin at koma við fleiri tilmælum seinni í hesi tingsetuni og vil hava í boði at gera viðmerkingar aftur, tá ið fleiri broytingar skulu gerast í barsilslógini. Til seinast verður heitt á Umhvørvismálaráðið um at virða, at hoyringarfreistin skal vera fýra vikur. Sí fylgiskjal 11.

Umhvørvismálaráðið skal gera vart við, at spurningurin um javning av barsilsútgjaldinum verður tikin upp aftur næstu ferð, tá ið barsilslógin verður broytt. Tað hevði verið gott, um Javnstøðunevndin sendir tilmælir til broytingar í barsilslógini, so skjótt sum innanhýsis endurskoðanin av barsilsøkinum er liðug, so hædd kann takast fyri hesum í sambandi við arbeiðið við at endurskoða barsilslógina. Umhvørvismálaráðið tekur áheitanina um at halda hoyringarfreistir til sín í tann mun, tað ber til.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tekur undir við ætlaðu broytingunum í barsilslógini. Sí fylgiskjal 12.

Samverk tekur undir við lógaruppskotinum. Samverk mælir til, at arbeitt verður við at fáa hægsta útgjaldið úr Barsilsgrunninum upp á uml. 40.000 kr., og at útgjaldið úr Barsilsskipanini frameftir kemur at fylgja løngargongdini á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Tað kundi verið gjørt á tann hátt, at útgjaldið frameftir verður regulerað eftir t.d. sáttmálanum hjá Samverk; fær Samverk eina lønarhækkan á 3%, so hækkaði útgjaldið úr Barsilsskipanini við sama prosentparti, sum Samverk fekk. Sí fylgiskjal 13.

Umhvørvismálaráðið hevur valt ikki at taka hugskotið um javningarleistin við í lógaruppskotið, men skal gera vart við, at spurningurin um javning av barsilsútgjaldinum verður tikin upp aftur næstu ferð, tá ið barsilslógin verður broytt. Í hesum umfari er valt at skjóta upp, at hámarkið

fyri mánaðarligum barsilspeningi hækkar til 30.000 kr., tí at hetta verður mett at rúmast innan fyri verandi fígging av Barsilsgrunninum.

Yngri Læknar Føroyar viðmæla Løgtinginum at samtykkja lógaruppskotið. Yngri Læknar Føroyar meta, at útgjøldini úr Barsilsgrunninum skulu fylgja lønarviðurskiftunum og inflatiónini, og tá ið Barsilsgrunnurin verður fíggjaður við einum prosentgjaldið av lønarinntøkunum hjá arbeiðsfjøldini, eigur tað at vera haldført at leypandi hækka hámarksútgjalið.

Umhvørvismálaráðið skal gera vart við, at spurningurin um javning av barsilsútgjaldinum verður tikin upp aftur næstu ferð, tá ið barsilslógin verður broytt.

Yrkisfelagið Miðnám heldur, at hækkingin av hámarkinum fyri mánaðarligum barsilspeningi við 5.000 kr. er lítil og tekur ikki hædd fyri øktum fíggjarligum útreiðslum í gerandisdegnum og fyri, at hægsta útgjaldið frammanundan er lágt. Limirnir í felagnum mugu niður í løn, um teir skulu í barsil, og hetta streingir familjur óneyðugt. Broytingin broytir ikki veruligu støðuna hjá barnafamiljum. Felagið heldur tað vera gleðiligt, at atlit nú verður tikið at nýútbúnum, og at størri fleksibilitetur í útrokningartíðarskeiðinum og útrokningargrundarlagnum eigur at vera fyri øll. Uppskotið átti eisini at havt ásetingar um minstaútgjald til teirra, ið gerast við barn í serliga ungum aldri. Spurt verður um, um tað er hugsað um GDPR í sambandi við, at landsstýrisfólkið kann fáa persónupplýsingar, og hví hesar upplýsingar ikki fara beinleiðis til Barsilsskipanina, og hvørja trygd borgarin hevur fyri, at upplýsingarnar bert fara í tær hendur, har tær eru neyðugar. Sí fylgiskjal 16**.**

Umhvørvismálaráðið vísir á, at í hesum umfari er valt at skjóta upp, at hámarkið fyri mánaðarligan barsilspening hækkar upp í 30.000 kr., tí at hetta verður mett at rúmast innan fyri verandi fígging av Barsilsgrunninum. Spurningarnir um størri fleksibilitet í Barsilsskipanini og minstaútgjald verða tiknir upp í sambandi við endurskoðan av barsilslógini í næstum. Umhvørvismálaráðið hevur skrivað meira ítøkiliga um viðgerð av persónupplýsingum í serligu viðmerkingunum í lógaruppskotinum, serliga til § 1, nr. 12 og 13. Talan er bara um upplýsingar, sum Barsilsskipanin hevur tørv á fyri at kunna viðgera umsóknir um barsilspening, og sum borgarin undir øllum umstøðum kortini hevði skulað latið Barsilsskipanini. Felagið spyr, hví upplýsingarnar ikki fara beinleiðis til Barsilsskipanina; tað gera tær. Umsitingin av barsilslógini er løgd til TAKS sambært § 25 í barsilslógini, og tí er javntekin millum Barsilsskipanina og landsstýrisfólkið, tá ið tað kemur til umsiting av barsilslógini, tó ikki viðvíkjandi heimildunum at áseta reglur.

Farmakonomfelagið, fylgiskjal 5, **Fíggjarmálaráðið**, fylgiskjal 7, **Heilsumálaráðið**, fylgiskjal 9, **Heilsurøktarafelagið**, fylgiskjal 10, og **Uttanríkis- og vinnumálaráðið**, fylgiskjal 14, høvdu ongar viðmerkingar til uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fíggjarligar avleiðingar fyri Barsilsskipanina

Verður hámarksupphæddin fyri útgjald úr Barsilsskipanini hækkað við 5.000 kr. um mánaðin, verður tað mett at økja útgjaldið úr Barsilsskipanini við 16,3 mió. kr. um árið.

Tað er ilt at meta um, hvat tað kostar at lata lestrarstuðulin telja við í útrokningargrundarlagnum hjá nýútbúnum. Tað finnast ikki tøl fyri, hvussu nógv fara í barnsburðarfarloyvi eftir loknan lesnað. Áður er mett, við støði í gongdini í barnatalinum hjá lesandi á hægri lestri, at mest sannlíkt fara millum tvey og fimm foreldur í barsil fyrstu tríggjar mánaðirnar eftir loknan lesnað hvørt skúlaár. Hetta eru tey foreldur, sum fáa størsta ágóðan av broytingini, tí at hesi ikki náa at vera nóg leingi í arbeiði til at tryggja sær barsilsútgjald við tí stytta útrokningartíðarskeiðinum. Um í miðal fimm foreldur, ið hava fingið vanligan lestrarstuðul á 4.960 kr. um mánaðin, á hendan hátt fáa lestrarstuðulin við í útrokningargrundarlagið, so kostar hetta Barsilsskipanini minni enn 300.000 kr. um árið. Um hesi foreldur hava havt eitt arbeiði í lestrartíðini, so telur lønarinntøkan longu við í útrokningargrundarlagnum og er tí ikki ein økt útreiðsla til Barsilsskipanina.

Tað eru eisini nøkur foreldur, sum fáa børn seinni enn tríggjar mánaðir eftir loknan lestur, men sum ikki hava fingið eitt arbeiði og hava harvið ikki eitt útrokningargrundarlag við tí stytta tíðarskeiðinum. Hesi fáa eisini ágóðan av broytingini. Um talan er um fimm foreldur árliga, so kostar hetta skipanini upp til 300.000 kr. aftrat.

Um hesar fyritreytir halda, økir lógaruppskotið útgjaldið úr Barsilsskipanini við umleið 16,9 mió. kr. árliga.

Vanliga eiga ábøtur á Barsilsskipanina at verða fíggjaðar við, at inngjaldið í skipanina verður hækkað. Tað er tó ein sannroynd, at Barsilsskipanin hevur havt eitt avlop á meira enn 40 mió. kr. síðani 2021, tá inngjaldið seinast hækkaði. Um ikki munandi broytingar verða í føðitalinum, fer skipanin sannlíkt at hava eitt árligt avlop á yvir 20 mió. kr. Aftrat hesum hevur skipanin nú tann neyðuga "buffaran" á yvir 30 mió. kr., ið skal lofta sveiggjum í inn- og útgjøldum. Tískil verður mett, at tað ikki er neyðugt at hækka inngjaldið til at fíggja hesa øking í útgjaldi.

Tá ið broytingar fyrr eru gjørdar í kt-skipanini hjá Barsilsskipanini, hevur tað kostað umleið 30-100.000 kr. Væntandi fer kostnaðurin hesa ferð at vera á leið tann sami.

Fíggjarligar avleiðingar fyri almennar arbeiðsgevarar

Almennir arbeiðsgevarar rinda løn til løntakarar, ímeðan teir eru í barsilsfarloyvi. Arbeiðsgevarar, ið rinda løn undir barsilsfarloyvi, fáa endurrindað tann barsilspeningin, sum løntakarin hevði havt rætt til, um viðkomandi ikki fekk løn í sambandi við barsilsfarloyvi. Lógaruppskotið hevur við sær, at teir arbeiðsgevarar, sum rinda løn undir barsilsfarloyvi, kunnu fáa endurrindað upp til 30.000 kr. um mánaðin frá Barsilsskipanini í mun til 25.000 kr., sum støðan er nú. Viðmerkjast skal, at sambært § 15 a í barsilslógini er tað framvegis eitt krav, fyri at landsstýrið og stovnar undir landinum skulu fáa barsilspening, at starvsfólk verður sett í staðin fyri tann, ið fer í barsilsfarloyvi.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ta umsitingarligu avleiðing, at broytingar skulu gerast í kt-skipanini hjá Barsilsskipanini. Harumframt fær landsstýrisfólkið heimild at seta krav um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast Barsilsskipanini elektroniskt. Hetta fer at vera ein fyrimunur, tí at tað slepst undan at senda pappírsumsóknir við posti ella at útfylla hesar manuelt og síðan skanna tær inn og senda elektroniskt til Barsilsskipanina.

Av tí at skotið er upp, at lógin er galdandi fyri øll barsilsfarloyvir við barsilsútgjaldi eftir 1. juli 2024, hevur tað við sær, at Barsilsskipanin má umsita við tveimum hámørkum í upp til eitt ár. Hetta kemst av, at umsóknarfreistin at søkja um barsilspening er eitt ár eftir barnsburð. Tí kann tað verða, at onkur søkir um barsilspening fyri tíðarskeið, sum liggja bæði áðrenn og aftan á 1. juli 2024.

Harumframt hevur tað umsitingarligar avleiðingar fyri Barsilsskipanina, at nýútbúgvin skulu fáa barsilspening, sum skal roknast á ein annan hátt enn vanliga útrokningargrundarlagið.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Barsilspeningur

Arbeiðsgevarar, sum rinda løn til løntakarar, ímeðan teir eru í barsilsfarloyvi, fáa endurrindað tann barsilspeningin, sum løntakarin hevði havt rætt til, um viðkomandi ikki fekk løn í sambandi við barsilsfarloyvi. Lógaruppskotið hevur við sær, at teir arbeiðsgevarar, sum rinda løn í sambandi við barsilsfarloyvi, kunnu fáa endurrindað upp til 30.000 kr. um mánaðin frá Barsilsskipanini í mun til 25.000 kr., sum støðan er nú. Lógaruppskotið hevur fyrimun við sær fyri teir arbeiðsgevarar, ið rinda omanfyri 25.000 kr. um mánaðin í løn til starvsfólk, ið fara í barsilsfarloyvi.

Umsitingarligar avleiðingar

Landsstýrisfólkið fær heimild at seta krav um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast Barsilsskipanini elektroniskt. Hetta fer at vera ein fyrimunur, tí at tað slepst undan at senda pappírsumsóknir við posti.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Av tí at lógaruppskotið hevur við sær, at meira verður goldið út í barsilspeningi, kann væntast, at hetta fer at hava eina meirnýtslu við sær, og tað kann hava avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Løntakarar

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri løntakararnar í Føroyum. Teir løntakarar, ið fara í barsilsfarloyvi, kunnu við hesum lógaruppskotinum fáa upp til 30.000 kr. í barsilspeningi um mánaðin umframt eftirlønargjaldið. Lógaruppskotið hevur fyrimun við sær fyri teir løntakarar, ið tjena omanfyri 25.000 kr. um mánaðin.

Aldursmarkið á teimum gjaldskyldugu

Aldursmarkið á 67 ár fer frameftir at fylgja fólkapensjónsaldrinum sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

Umsitingarligar avleiðingar
Landsstýrisfólkið fær heimild at seta krav um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast Barsilsskipanini elektroniskt. Hetta fer at vera ein fyrimunur, tí at tað slepst undan at senda pappírsumsóknir við posti.

Nýútbúgvin
Nýútbúgvin fáa við hesum uppskotinum betri sømdir í sambandi við viðgongutíð, barnsburð og ættleiðing, tí at tann lestrarstuðulin, ið tey hava móttikið seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn barsilsfarloyvið byrjar, verður taldur við í útrokningargrundarlagnum, sum barsilspeningur verður roknaður eftir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd er viðkomandi fyri barsilslógina. Tó hevur hetta lógaruppskotið onga broyting í mun til sambandið millum barsilslógina og norðurlendska sáttmálan um almannatrygd.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tað er onki í lógaruppskotinum, sum er í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan, evropeiska mannarættindasáttmálan ella sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at lógaruppskotið elvir til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir. Lógaruppskotið ger heldur ikki inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Mett verður, at verandi inngjøld í Barsilsgrunnin eru nøktandi til at fíggja ta øking í útgjaldi, sum lógaruppskotið hevur við sær. Barsilsgjaldið verður tí óbroytt. Víst verður til pkt. 2.1. omanfyri.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið broytir ikki barsilsgjaldið. Víst verður til pkt. 2.1.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella krøv um loyvi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið gevur landsstýrisfólkinum heimild til at áseta reglur um barsilspening til nýútbúgvin.

Lógaruppskotið gevur eisini landsstýrisfólkinum heimild til at áseta reglur um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast Barsilsskipanini elektroniskt, og kann áseta nærri reglur um elektroniska samskiftið.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Javnstøðunevndin, akademisku fakfeløgini, Føroya Arbeiðsgevarafelag og aðrir samfelagspartar hava áður gjørt vart við, at tað er ein trupulleiki fyri javnstøðuna, at barsilspeningurin í mesta lagi kann vera 25.000 kr. um mánaðin.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Nr. 1
Landsstýrismaðurin verður broytt til landsstýrisfólkið alla staðni í lógini.

Nr. 2
Rættindir og skyldur sambært barsilslógini eru knýtt at móttiknum inntøkum, sum eftir skattalógini eru A-inntøkur, og inntøkum av sjálvstøðugari vinnu. Barsilspeningur er endurrindan fyri inntøkutap, ið stendst av barnsburði. Tað, sum er avgerandi fyri, um – og í hvønn mun – barsilspeningur skal útgjaldast ella gjaldast skal til skipanina, er, um inntøkurnar kunnu verða mistar orsakað av barnsburði ella ættleiðing. Inntøkur, sum kunnu verða mistar orsakað av barnsburði, eru inntøkur av egnum arbeiði, lønarinntøkur, inntøkur, ið koma í staðin fyri lønarinntøku, ella inntøkur av sjálvstøðugum vinnuvirksemi.

Inntøka av sjálvstøðugum vinnuvirksemi er ikki A-inntøka, og tí rinda hesi ikki inn til Barsilsskipanina sjálvvirkandi umvegis afturhaldsskipanina hjá TAKS. Sjálvstøðug vinnurekandi kunnu í staðin tekna sær eina sjálvbodna barsilspeningatrygging, sum kostar 3.000 kr. um ári. Støddin á barsilspeninginum tekur støði í inntøkuni frá sjálvstøðuga vinnuvirkseminum fyri síðst lokna roknskaparár.

Lestrarstuðul er ikki A-inntøka, og tí verður barsilsgjald ikki rindað av lestrarstuðli, og lestrarstuðulin telur heldur ikki við í útrokningargrundarlagnum, sum barsilspeningur verður roknaður eftir. Við hesum uppskotinum verður hetta broytt, soleiðis at tey, sum eru nýútbúgvin og hava móttikið lestrarstuðul frá Studna, kunnu fáa barsilspening grundað á móttikna lestrarstuðulin. Eyðkent fyri nýútbúgvin er, at talan er um ung fólk í burðarførum aldri. Gerast hesi foreldur, áðrenn tey eru komin á arbeiðsmarknaðin, hava tey ikki rætt til barsilspening. Fyri at gera umstøðurnar hjá teimum nýútbúnu betri í sambandi við viðgongutíð, barnsburð og ættleiðing verður skotið upp, at hesi skulu fáa barsilspening í sama mun, sum tey hava fingið lestrarstuðul.

Munur er tó á lesandi í Føroyum og teimum, sum hava lisið í útlandinum. SU (Statens Uddannelsesstøtte) verður mett sum A-inntøka, tí at SU er skattskyldug inntøka. Tí verður barsilspeningur roknaður av SU, sum er móttikið seinastu 12 mánaðirnar framman undan einum barsilsfarloyvi.

Broytingin í § 8, stk. 2 hevur við sær, at føroyskur lestrarstuðul verður taldur við í tær inntøkur, sum verða endurrindaðar úr Barsilsskipanini. Tó er ikki ætlanin, at tey lesandi skulu rinda barsilsgjald av lestrarstuðlinum.

Við broyttu ásetingini í § 8, stk. 2 verður ásett, at rættindir og skyldur eru knýtt at lestrarstudningi í tann mun, tað er ásett í § 20 a í løgtingslógini. § 20 a er nýggj og er partur av hesum lógaruppskotinum. Víst verður til serligu viðmerkingarnar niðanfyri til § 1, nr. 11.

Nr. 3
Barsilspeningur er 100% av A-inntøkuni, sum løntakarin í miðal hevur móttikið seinastu 12 mánaðirnar undan barsilsfarloyvinum. Tó kann barsilspeningurin í mesta lagi vera 25.000 kr. um mánaðin umframt eftirlønargjaldið. Tá ið Barsilsskipanin varð sett á stovn í 2001 var

hámarkið 35.000 kr. um mánaðin. Í 2004 varð hámarkið lækkað niður í 25.000 kr. um mánaðin og hevur síðan verið óbroytt. Í løgtingslógini er ein heimild til landsstýrismannin at hækka hámarkið við støði í lønargongdini í samfelagnum, men hon hevur ongantíð verið brúkt.

Lógarbroytingin hevur við sær, at hámarkið fyri mánaðarliga útgjaldið úr Barsilsskipanini verður hækkað við 5.000 kr.; úr 25.000 kr. upp í 30.000 kr. Á henda hátt fáa tey, ið vanliga vinna omanfyri 25.000 kr. um mánaðin, endurrindað upp til 30.000 kr. úr Barsilsskipanini, tá ið tey fara í barsilsfarloyvi.

Nr. 4
Landsstýrismaðurin verður broytt til landsstýrisfólkið.

Nr. 5
Landsstýrismanninum verður broytt til landsstýrisfólkinum.

Nr. 6
"Landsstýrismaðurin í vinnumálum" verður broytt til "landsstýrisfólkið". Sambært pkt. 1.2.2.14. í rundskrivinum um lógarsmíð skal tað ikki standa í løgtingslógini, hvør landsstýrismaður skal gera nærri reglur, tí at tað er løgmaður, sum býtir málsøkini millum landsstýrismenninar sambært § 33, stk. 1 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya. Barsilslógin hevur seinastu árini ligið hjá fleiri ymiskum aðalráðum, og tí er tað ikki rætt, at tað er landsstýrismaðurin í vinnumálum, sum ásetir nærri reglur sambært barsilslógini. Broytingin hevur ikki materiella broyting við sær.

Nr. 7
Aldursmarkið fyri tey, sum hava skyldu at rinda barsilsgjald, er frá og við 16 ár til og við 66 ár. Skotið verður upp, at aldursmarkið heldur skal fylgja fólkapensjónsaldrinum, soleiðis at skyldan at rinda barsilsgjald heldur uppat, tá ið persónar fáa rætt til pensjón. Ásett er í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., at fólkapensjónsaldurin hækkar úr 67 árum upp í 67 ½ ár og síðan 68 ár. Fyri at tað ikki skal vera neyðugt leypandi at broyta aldursmarkið í barsilslógini, verður ásett, at aldursmarkið fylgir fólkapensjónsaldrinum, sum hann er ásettur í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

Nr. 8
Barsilsgjald verður sum útgangsstøði goldið av allari móttiknari og rindaðari A-inntøku, men sambært § 18, stk. 1, nr. 1 eru fólka- og fyritíðarpensjónir undantiknar. Í almannapensjónslógini er nú ásett eitt nýtt slag av pensjón, sum nevnist "framskundað pensjón", og barsilsgjald eigur ikki at verða rindað av hesi pensjón. Talan er ikki um ein nýggjan málbólk, men heldur at nakrir borgarar í staðin fyri fyritíðarpensjón nú fáa framskundaða pensjón. Í praksis verður framskundað pensjón útgoldin á sama hátt sum fyritíðarpensjón, og hesi rinda tí ikki barsilsgjald av pensjónini í dag. Tí verður skotið upp at tillaga barsilslógina til royndum, soleiðis at ongin ivi er um, at barsilsgjald heldur ikki skal rindast av framskundaðari pensjón.

Nr. 9
Barsilsgjald verður sum útgangsstøði goldið av allari móttiknari og rindaðari A-inntøku, men sambært § 18, stk. 1, nr. 2 í barsilslógini eru almannaveitingar undantiknar. Tó eru nakrar veitingar frá Almannaverkinum, ið barsilsgjald skal rindast av, og sum eisini telja við í útrokningargrundarlagnum, tá ið barsilspeningur skal roknast. Talan er fyri tað fyrsta um dagpening sambært løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m. Hetta verður ikki broytt við hesum lógaruppskotinum. Endurgjald fyri inntøkumiss sambært § 17,

stk. 3 í forsorgarlógini er heldur ikki undantikið. Forsorgarlógin varð tó avtikin, tá ið løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur varð sett í gildi 1. januar 2021. Við lógarbroytingini verður tilvísingin rættað samsvarandi nýggju løgtingslógini um almannatrygd og tænastur. Talan er um eina fylgibroyting, sum ikki hevur materiellar broytingar við sær.

Harumframt verður lønarískoyti til tillagað starv sambært løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk sett inn í § 18, stk. 1, nr. 2, soleiðis at barsilsgjald skal verða kravt av lønarískoytinum. Talan er ikki um eina materiella broyting, men eina tillaging til praksis, tí barsilsgjald verður longu kravt av lønarískoyti til tillagað starv. Barsilsskipanin er ein arbeiðsmarknaðarskipan, sum veitir endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku til løntakarar, ið fara í barsilsfarloyvi. Endurgjald verður eisini veitt fyri tær veitingar, ið koma í staðin fyri løn. Tí eigur barsilsgjald eisini at verða kravt av teimum veitingum, ið koma í staðin fyri løn.

Nr. 10
Heitið á kapitli VII verður broytt, so tað samsvarar betur við innihaldið í kapitlinum, nú ið ein áseting um nýútbúgvin verður sett í kapittulin.

Nr. 11
Lestrarstuðul er ikki ein A-inntøka og gevur tí hvørki rættindir ella skyldur í barsilslógini. Lesandi, sum fáa børn, hava rætt til studning í upp til 11 mánaðir fyri hvønn barnsburð. Tey, ið eru útbúgvin hava harafturímóti ikki rætt til lestrarstuðul longur, og tey hava eins og lesandi einans rætt til barsilspening í tann mun, tey hava arbeitt við síðuna av lesnaðinum, um tey gerast foreldur beint eftir loknan lesnað. Ofta hevur verið tosað um, at tey nýútbúnu detta niður í millum skipanirnar, tí tey ikki longur eru í lestrarskipanini og eru ikki rættiliga komin inn á arbeiðsmarknaðin og hava tí ikki rættindir í Barsilsskipanini. Og um tey t.d. eiga eina uppsparing, sum er størri enn 30.000 kr., hava tey ikki møguleika fyri at fáa fyribils uppihaldsveiting í sambandi við barnsburð frá Almannaverkinum.

Um so er, at ein, sum er nýútbúgvin, fær starv eftir loknan lesnað og harvið er nýggjur á arbeiðsmarknaðinum, kann eitt styttri útrokningartíðarskeið nýtast til at rokna barsilspeningin, um viðkomandi hevur fingið eitt starv eftir loknan lesnað og hevur arbeitt í minsta lagi í tríggjar mánaðir framman undan barsilsfarloyvinum.

Við hesum verður skotið upp, at um viðkomandi, sum søkir um barsilspening, kann skjalprógva at hava lokið eina útbúgving, sum hevur givið rætt til lestrarstuðul, verður lestrarstuðul, móttikin seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn barsilsfarloyvið byrjar, taldur við í útrokningargrundarlagnum, sum barsilspeningur verður roknaður eftir. Lestrarstuðul, sum tann nýútbúni hevur móttikið seinasta árið áðrenn barsilsfarloyvið, telur tí eins og móttikin A-inntøka við í útrokningargrundarlagnum, tá ið barsilspeningur skal roknast til nýútbúgvin.

Fyri at lestrarstuðulin skal verða taldur við í útrokningargrundarlagnum, er tað ein treyt, at viðkomandi ikki longur hevur rætt til studning frá Studna. Um viðkomandi t.d. er liðugur við eina miðnámsskúlaútbúgving og er farin undir víðari lesnað, sum eisini gevur rætt til studning frá Studna, er viðkomandi fevndur av reglunum fyri barnsburðarfarloyvisstudning og hevur harvið framhaldandi sama inntøkugrundarlag í barsilsfarloyvistíðarskeiðinum, sum áðrenn farloyvið. Harumframt verður barnastudningur veittur fyri hvørt barnið, umframt at søkjast kann um fyribils uppihaldsveiting í sambandi við barnsburð frá Almannaverkinum. Fyribils uppihaldsveitingin í sambandi við barnsburð verður veitt, soleiðis at fyribils uppihaldsveitingin og inntøkan annars tilsamans eru ávikavist 13.928 kr. um mánaðin fyri sambúgvandi og 17.907

kr. um mánaðin fyri stakar uppihaldarar. Uppskotið hevur ikki broyting við sær fyri lesandi, sum tí framvegis fara at hava rætt til barsilspening í tann mun, tey hava haft A-inntøku við síðuna av lesnaðinum.

Grundgevingin fyri at geva nýútbúnum betri sømdir í Barsilsskipanini er, at tey nýútbúnu jú hava nomið sær útbúgving, sum skal brúkast á arbeiðsmarknaðinum, og at flestu av teimum fara at rinda inn til Barsilsskipanina av framtíðarløninni alt arbeiðslívið. Á hendan hátt detta tey nýútbúnu ikki niður í millum skipanina við lestrarstuðli og Barsilsskipanina, um tey gerast foreldur í tíðarskeiðinum eftir loknan lestur, og áðrenn tey eru komin í arbeiði. Tað skal ikki vera ein forðing at fáa sær børn, bara tí at viðkomandi er nýútbúgvin og enn ikki hevur fingið fótin fyri seg á arbeiðsmarknaðinum.

Nærri reglur um barsilspening til nýútbúgvin verða ásettar av landsstýrisfólkinum í kunngerð. Hetta kann t.d. vera reglur um, um ella í hvønn mun lestrarstuðul skal telja við í útrokningargrundarlagnum, samstundis sum viðkomandi er nýggjur á arbeiðsmarknaðinum, og tað stytta útrokningartíðarskeiðið kann nýtast til at rokna barsilspening eftir. Og reglur um, hvørji skjøl o.a. tann nýútbúni skal lata Barsilsskipanini.

Nr. 12
Verður søkt um barsilspening í upp til fýra vikur áðrenn barnsburð, skal bræv latast Barsilsskipanini um skurðviðgerð (keisaraskurð) ella skjalprógv fyri mettum føðidegi, ið ljósmóðir, lækni ella tílíkur persónur hevur váttað. Og um søkt verður um barsilspening eftir barnsburð, skal fráboðan um barnsburð latast Barsilsskipanini saman við umsóknini um barsilspening. Um søkt verður um barsilspening frá tí degi, mett verður, at átta vikur eru eftir til barnsburð, skal tað við læknaváttan prógvast, at tað stendst heilsuvandi fyri fostur og/ella kvinnuna av at vera í starvinum. Í sambandi við barsilsfarloyvi, tá ið foreldur ættleiða, er tað ein treyt, at ættleiðingarmyndugleikin, sum er Familjufyrisitingin, hevur tikið ta avgerð, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima i sambandi við, at tey fáa barnið.

Við hesi áseting verður heimilað, at Barsilsskipanin kann fáa váttan um mettan føðidag og fráboðan um barnsburð beinleiðis frá Heilsuverkinum umframt læknaváttan um, at tað stendst heilsuvandi fyri fostrið og/ella kvinnuna sjálva av at vera í starvinum. Eisini verður tað heimilað, at Barsilsskipanin kann fáa váttan um faðirskap og sammóðurskap og avgerð um, at annað ella bæði foreldrini skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa eitt barn við ættleiðing, beinleiðis frá Familjufyrisitingini. Talan er um persónupplýsingar, og tí skal viðgerð av hesum upplýsingum fara fram sambært dátuverndarlógini. Hetta hevur m.a. við sær, at einans upplýsingar, sum eru nøktandi, viðkomandi og avmarkaðar til tað, sum er neyðugt fyri at kunna útinna uppgávurnar sambært barsilslógini, kunnu heintast frá øðrum myndugleikum.

Ásetingin hevur við sær, at tey, sum søkja um barsilspening, ikki noyðast at lata Barsilsskipanini nevndu upplýsingar, um Barsilsskipanin fær hesar upplýsingar beinleiðis frá Heilsuverkinum og Familjufyrisitingini.

Hetta er ein fyrimunur fyri umsøkjararnar, tí teir sleppa undan at útvega sær váttanir frá Heilsuverkinum ella Familjufyrisitingini fyri síðan at senda til Barsilsskipanina. Harumframt sampakkar hetta væl við nýggju kt-skipanina, ið verður ment til Barsilsskipanina, og sum skal gera, at málsviðgerðin av umsóknum um barsilspening skal blíva meira sjálvvirkandi.

Nr. 13

Nýggj kt-skipan verður ment til Barsilsskipanina. Sí LM-063/2023 Uppskot til løgtingslóg um at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina. Ætlanin er, at skipanin í størstan mun kann málsviðgera umsóknir um barsilspening sjálvvirkandi. Ætlanin er, at skipanin skal brúka tær upplýsingar, sum longu eru í almennum skipanum, og fylla umsóknina so nógv út, sum til ber, har tann, sum søkir um barsilspening, síðan skal góðkenna umsóknina ella rætta hana til um neyðugt. Talan er t.d. um upplýsingar frá Fólkayvirlitinum um t.d. bústað, føðidato og hjúnalagsstøðu, váttan um mettan føðidag og fráboðan um barnsburð frá Heilsuverkinum og um upplýsingar úr Virkisskránni um arbeiðsgevaran.

Hóast skipanin, í tann mun tað ber til, skal málsviðgera umsóknir um barsilspening sjálvvirkandi, fer skipanin ikki sjálvvirkandi at kunna nokta umsókn um barsilspening. Um skipanin fer at koma fram til, at ein umsókn um barsilspening kann noktast, fer málið altíð at verða lagt fyri ein málsviðgera at eftirkanna, um allar viðkomandi upplýsingar eru fingnar til vega, og um tað er rætt at nokta viðkomandi barsilspening.

Talgildu upplýsingarnar, sum landsstýrisfólkið kann útvega sær beinleiðis frá viðkomandi myndugleikum, eru í stóran mun persónupplýsingar, sum eru fevndar av dátuverndarlógini. Fyri at virða meginregluna um dátuminimering í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum, sum er ásett í § 7, stk. 1, nr. 3 í dátuverndarlógini, skal atgongdin til persónupplýsingarnar, sum beinleiðis atgongd verður fingin til, verða avmarkað til tær upplýsingar, sum er neyðugar, fyri at landsstýrisfólkið kann útinna uppgávurnar sambært barsilslógini. Talan er sostatt um upplýsingar so sum upplýsingar frá Fólkayvirlitinum um t.d. bústað, føðidato og hjúnalagsstøðu, váttan um mettan føðidag og fráboðan um barnsburð frá Heilsuverkinum o.a., sum skulu til, fyri at barsilspeningur kann útroknast, og eftirlit kann havast við inngjøldum og útgjøldum í og úr Barsilsgrunninum.

Nr. 14
Talan er um eina fylgibroyting av, at landsstýrismaðurin verður broytt til landsstýrisfólkið.

Nr. 15
Tað krevur heimild í løgtingslóg, um tað skal verða kravt av borgara ella fyritøku, at tey skulu samskifta við almennar myndugleikar elektroniskt ella talgilt. Í sambandi við, at ein nýggj kt-skipan til Barsilsskipanina verður ment, er neyðugt at fáa eina heimild í barsilslógina, soleiðis at tað kann verða kravt, at upplýsingar skulu latast Barsilsskipanini elektroniskt ella talgilt. Sambært rundskrivinum um lógarsmíð pkt. 3.7.1. er alt talgilt samskifti elektroniskt, men ikki alt elektroniskt samskifti er talgilt. Tí er valt at brúka elektroniskt heldur enn talgilt, tí elektroniskt er breiðari og fevnir um bæði.

Sum nú er, verður umsóknarblað fylt út og sent Barsilsskipanini. Tað er bæði tíðarkrevjandi og ótíðarhóskandi. Ætlanin er, at frameftir skal søkjast um barsilspening umvegis teldu, snildfon ella teldil. Neyðugt verður sostatt at lata Barsilsskipanini upplýsingar talgilt ella elektroniskt um m.a. navn, væntað føðidato, føðidato, ættleiðingardato, kontunummar, um viðkomandi er einsamøll/einsamallur við barninum, longd á barsilsfarloyvinum, setanarviðurskiftir og aðrar upplýsingar, sum eru neyðugar, fyri at viðkomandi kann fáa barsilspening úr Barsilsskipanini.

Til § 2
§ 2 er áseting um gildiskomu, og hvør verður fevndur av lógarbroytingini. Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. juli 2024, og at lógin hevur virknað fyri øll barsilsfarloyvi við barsilsútgjaldi, sum verða hildin eftir 1. juli 2024.

Viðvíkjandi nýggja hámarkinum á 30.000 kr. er ætlanin, at barsilspeningurin hækkar hjá øllum, sum eru í barsilsfarloyvi við barsilspeningi 1. juli 2024, og sum eru skerd av hámarkinum. Hetta er galdandi, óansæð nær barnið er føtt; treytin er, at viðkomandi er í barsilsfarloyvi eftir skeringsdagin. Hetta hevur við sær, Barsilsskipanin skal umsita tvey hámørk í eitt tíðarskeið á upp til eitt ár. Orsøkin er, at umsóknarfreistin at søkja um barsilspening er eitt ár eftir barnsburð, og tí verða tey nógv, sum søkja um barsilspening fyri tíðarskeið, sum liggja áðrenn og aftaná skeringsdagin.

Orsøkin til at skotið verður upp at gera skiftið til nýggju reglarnar á hendan hátt er, at so verða øll, sum eru í barsilsfarloyvi við barsilsútgjaldi, viðgjørd eftir somu reglum. Á henda hátt verður ikki munur á teimum, sum gerast foreldur í t.d. juni 2024, og teimum, sum gerast foreldur eftir 1. juli 2024, tí at hámarkið hjá øllum hækkar samstundis. Sum víst á fer hetta tó at hava meira umsiting við sær fyri Barsilsskipanina í eini skiftistíð á upp til eitt ár.

Umhvørvismálaráðið, 7. mars 2024.

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna

/ Pól E. Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Almanna- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Áhugafelagnum Antares
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Dátueftirlitinum
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Fakfelagssamstarvinum
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Farmakonomfelagnum
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 9: Hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 10: Hoyringarsvar frá Heilsurøktarafelagnum
Fylgiskjal 11: Hoyringarsvar frá Javnstøðunevndini
Fylgiskjal 12: Hoyringarsvar frá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum
Fylgiskjal 13: Hoyringarsvar frá Samverk
Fylgiskjal 14: Hoyringarsvar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 15: Hoyringarsvar frá Yngri Læknar Føroyar
Fylgiskjal 16: Hoyringarsvar frá Yrkisfelagnum Miðnám